# Nýggjur eiturkoppur funnin í Føroyum



*Larinoides umbricatus er eiturkoppaslag numar 68, sum er funnið í Føroyum.*

*Føroyar eru vorðnar enn eitt djóraslag ríkari. Hetta hendi í summar, tá ið tað varð staðfest, at ein stórur eiturkoppur, sum varð funnin við Løgmannabreyt í Hoyvík, ikki var funnin áður í Føroyum.*



EYÐFINN MAGNUSSEN
FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

Nakað undan ólavsøku kom ein maður til mín við einum stórum eiturkoppi, ið hann hevði funnið uttan fyri hús síni við Løgmannabreyt í Hoyvík. Eiturkoppurin var rættuliga stórur. Einar 15-20 mm. Afturparturin var eitt sindur samankroystur. Liturin skiftir millum at vera ljósa- og myrkabrúnur.

**At ferðast**

Tað var týðuligt, at tað var ikki ein av teimum heilt vanligu føroysku eiturkoppunum. Tá ið eg ikki eru fullkønur á økinum, varð hann tí sendur til Sven-Axel Bengtson á Zoologiska savninum í Lund í Svøríki. Sven-Axel er ein teirra, ið kennir mest til føroyskt djóralív, men heldur ikki hann var heilt vísur í hvat slag, tað var, og tí var eiturkoppurin sendur víðari til Bergen.

**Eiturkoppaserfrøðingur**

Har kundi Erling Hauge, eiturkoppaserfrøðingur skjótt staðfesta, at tað var ein eiturkoppur við tí latínska navninum *Larinoides umbricatus*. Erling var rættuliga ovfarin, tí hetta eiturkoppaslagið er ikki funnið áður í Føroyum. Heldur ikki finst hann í Íslandi, men er vanligur í Noregi, har hann er at síggja um vórarnar og sumrarnar, har hann gongur á húsaveggjum og í úthúsum.

**Nógv ymisk sløg**

*Larinoides umbricatus* var eiturkoppaslag nummar 68, sum er funnið í Føroyum. Vit vita rættuliga nógv um føroyskar eiturkoppar. Seinast í 1970-árunum gjørdu vísindafólk í Noregi og Svøríki umfatandi kanningar av teimum smærru dýrunum, sum eru í føroysku náttúruni. Kanningin fevndi um ymisk sløg av skordýrum og maðkum. Í hesum sambandi vórðu eiturkopparnir eisini kannaðir. Funnin vóru til samans 67 ymisk sløg. Tað var í flestu førum smáir eiturkoppar, sum liva í grasinum og niðri í moldini, og tí ikki síggjast so væl. At tað eru so nógv ymisk sløg av eiturkoppum í Føroyum, ger helst fólk bilsin. Øll kenna vit ein eiturkopp. Vit vita, at summir eru størri, og at aðrir eru smærri, men so nógv sløg? tað vistu vit ikki. Samanborið við okkara grannalond, er talið tó lítið. Talið á kendum eiturkoppasløgum í øllum heiminum er í dag umleið 32.000 ymisk sløg, og at halda skil á øllum hesum skriðkyktunum, tað krevur ein vitugan eiturkoppaserfrøðing.

**Talva: Tal á eiturkoppasløgum í Føroyum samanborið við heimin annars.**

| | |
|---|---|
| Føroyar | 68 sløg |
| Bretsku oyggjarnar | 570 sløg |
| Ísland | 190 sløg |
| Vesturnoreg | 270 sløg |
| Danmørk | 500 sløg |
| Heimurin annars | 32.000 sløg |

**EYÐFINN MAGNUSSEN**

er lívfrøðingur á Fróðskaparsetri Føroya. Hann er føddur í 1966. Tók prógv sum cand.scient í lívfrøði á universitetinum í Keypmannahavn í 1993. Síðan 1994 hevur hann starvast á Fróðskaparsetrinum. Tey fyrstu árini í parttíðarstarvi. Eyðfinn undirvísir í ymiskum lívfrøðilærugreinum, serliga lærugreinum, sum snúgva seg um vistfrøði. Haraftur-at leggur hann fakliga partin av lívfrøðiútbúgvingini til rættis og samskipar undirvísingina.

Teldupostur: eydfinnm@setur.fo